

# Undurverkið á Mols

**– Eg havi yvirhøvur einki angrað í lívi mínum. Skuldi eg livað lívið umaftur, so hevði eg gjørt tað sama einaferð afturat. Hetta sigur ein av teimum ovurtungu fólkunum, sum DR1 hevur tosað við í dokumentarrøðini »Undurverkið á Mols«**

Maðurin handan orðini eitur Simon Appel, ein 20 ára gamal maður úr Vesturjútlandi, sum síðani barndómin hevur verið ovurtungur.

Tá hann varð vigaður hjá klænkiserfrøðinginum á Ebletoft Kurcenter máttu tey brúka tvær vektir – men hvat vektirnar vístu, og hvussu nógv kilo Simon at enda msiti, tað verður at bíða til sendingin kemur á skíggjan. Tað sama er at siga um sexlívið hjá honum – ella um hann í heila tikið hevur nakað sexlív. Men Robin Schmidt og Mogens Cuber, sum hava gjørt sendingina, vóru í øllum førum so hugtiknir av Simon Appel – av hansara útstráling og sera góða matarlysti, at hetta heilt víst var evni til eina sendirøð um fiti. Kann nakar í rámasta álvara meina, at tað er feitt at vera feitur?

Í dokumentarsendingini sleppur hyggjarin inn í sálarlívið hjá nøkrum menniskjum, sum eru komin til Ebletoft Kurcenter fyri at broyta lívsstíl, men hetta er samstundis ein frásøgn um dagligt mirakkul, sum starvsfólkið á skeiðsmiðstøðini megna saman við skeiðluttakarunum.

– Vit skilja ikki, hví tað ikki fyri langari tíð síðani er vorðin ein fólkslig uppgáva at venda sær ímóti tendensinum at samfelagið í veruleikanum er við at drukna í feitti, sigur Flemming Darre, sum er dagligur leiðari á skeiðsmiðstøðini. Hann heldur ikki serliga nógv um fólkaheilsutiltøk og politiskt-korrektar útmeldingar av Christiansborg.

Vit mugu handla – og tí verður skeiðsluttøkan í Ebletoft eisini kallað fyri »byrjanin til títt persónliga Tour de France«. Eftir tveimum árum hevur miðstøðini slúsað 400 menniskju gjøgnum stranga programmið við píski og gularót – vælvitandi um, at tað er ikki fyrr enn skeiðið er liðugt, at veruliga stríðið byrjar.

– Ikki fyri at taka munnin ov fullan, men næstrakærleiki er nógv betri enn pillarar og slankikurar, leggur Mogens Cuber dent á eftir at hava fylt gongdini á skeiðsmiðstøðini. Hann hevur saman við Robin Schmidt, ið er produsentur, í hesum fýra sendingunum valt ein ógvuliga persónligan og viðhvørt ævintýrkendan frásøguhátt.

Fyrsti parturin av fýra av dokumentarsendingini »Undurverkið á Mols« verður sendur fríggjakvøldið 3. januar kl 19.




